# ÍTRÓTTARBLAÐIÐ

Sosialurin 17. februar 2010


# Rooney á toppinum

**Wayne Rooney verður í løtuni mettur sum kanska besti fótbóltsspælarin av øllum. Á San Siro prógvaði hann, hví so er**




Jákup Mørk

Tað tóktist annars ikki ganga nakran veg hjá Manchester United at vinna sín fyrsta útisigur móti AC Milan í stórdystinum í Champions League í gjárkvøldið.

Dysturin var ikki tríggjar minuttir gamal, tá David Beckham – sum altso spældi móti Manchester United – sendi frísparksbólt innfyri. Evra royndi at sparka burtur, men bólturin kom ikki longur enn til Ronaldinho, sum fluktaði bóltin í meskarnar umvegis beinið hjá Michael Carrick.

Og so sat Milan á tí mesta. Fleiri ferðir kundu kontra-álopini eins væl givið mál, men brádliga stóð á jøvnum, 1-1. Hetta tá Scholes var óvanliga heppin í síni skotroynd. Royndin miseydnaðist fullkomuliga, men bólturin støkk á vinstra bein, áðrenn hann smoygdi sær oman móti handara stólpa.

Eitt týðandi útivallarmál, kanska. Men á ongan hátt nóg mikið. Milan trýsti, og tvær ferðir mátti van der Saar prógva, at hann hóast síni 39 ár framvegis er ein málverji í altjóða toppflokki.

Og so var tað, at Rooney prógvaði sítt virði. Tvær ferðir stútaði hann innlegg í meskarnar, og við 1-3 á talvuni koyrdi alt rætta vegin hjá ensku meistarunum. Og hóast Seedorf móti dystarenda minkaði um munin og hóast Carrick i yvirtíini fekk sítt seinna gula kort, so skalaði hetta ikki frøina hjá liðnum. Ein sigur á útivølli móti AC Milan var úrslitið, sum øll í Manchester høvdu droymt um, og so eru útlitini fyri at gera arbeiðið liðugt heima á Old Trafford munandi betri.




Wayne Rooney verður í dag mettur sum heimsins besti fótbóltsspælari. Ein løtu royndi Ronaldinho at vísa, hví hann fyrr hevur átt hendan heiðurin, men Rooney vildi tað kortini øðrvísi

# Rás2 varpar flogbólts-finalurnar



Nú er greitt, at steypafinalurnar í flogbólti verða sendar beinleiðis á Rás2, tá hesar verða spældar leygardagin.

Rás2 og Flogbóltssambandið samdust í gjárkvøldið um, at sent verður beinleiðis, og verður tað Hilmar Jan Hansen, sum við vælkendu rødd síni enn einaferð fer at siga frá, hvussu tað gongur fyri seg, tá toppurin av føroyskum flogbólti dystast. Tað gjørdi Hilmar Jan Hansen eisini á Rás2, tá Oyggjaleikir vórðu hildnir á Álandi í summar.

- Ítróttturin er nakað, sum fyllir sín náttúrliga part á Rásini, og tí eru vit fegin um, at vit á henda hátt kunnu seta okkara merki á steypafinalurnar.

- Í hesum førinum er støðan so eisini tann, at Kringvarpið hevur valt, at tey ikki útvarpa dystin, og tí vildu vit fegin taka av hesum møguleikanum. Tí hóast tað avgjørt eru stuttligar avbjóðingar í ítróttinum, so gevur tað ikki meining fyri okkum, um vit skulu standa við síðuna av almenna kappingarneytanum og varpa út.

- Men í hesum førinum ber tað til hjá okkum at breiðka um útboðið í føroyskum útvarpi, og tað er avgjørt nakað, sum vit royna at virka fyri, sigur Jonhard Hammer, stjóri á Rás2.

-mørk

# Lyon skakaði milliardirnar

**Franska Lyon var ruddiliga omaná, tá teir í gjárkvøldið tóku móti milliarda-dýra hópinum hjá Real Madrid**




Jákup Mørk

1-0 er kanska ikki mest sannførandi sigurin av øllum. Men veruleikin er, at Lyon so ruddiliga var omaná, tá teir høvdu vitjan av Real Madrid.

Talan gjørdist tó bert um tað eina málið, sum Makoun langaði í netið úr 20 metrum, eftir at Madrid enn eina ferð hevði havt bóltmiss á miðvøllinum.

Kaka, Ronaldo og hinar stjørnurnar hjá Real Madrid royndu ófært, men eingin teirra megnaði at bróta væl skipaðu verjuna hjá Lyon, sum soleiðis fekk skapt sær eitt gott útgangsstøði, áðrenn teir skulu spæla returdyst á Bernabeau.

## FAKTA

**Dystirnir týskvøldið**

| | |
|---|---|
| AC Milan-Manchester United | 2-3 |
| Lyon-Real Madrid | 1-0 |

**Mikukvøldið**

Bayern München-Fiorentina

Porto-Arsenal